# Sørvágs skúli

Skúlavegur 13 . FO-380 Sørvágur
Tlf. 36 32 20 & 36 32 22
Fax 36 32 21 · sor@skulin.fo

## Lærarastarv í Sørvágs skúla

Søkt verður eftir lærara í tíðaravmarkað starv, fyri lærara í barnsburðarfarloyvi, 10. mars og skúlaárið út. Talan er um eitt fult starv við 25 undirvísingartímum.

- 2. – 4. flokkur: Heimkunnleiki
- 4. flokkur: Føroyskt
- 5. flokkur: Danskt
- 8. flokkur: Enskt
- 10. flokkur: Danskt
- Starvið umfatar eisini flokslæraravirksemi í 4. flokki.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18.1 – 27.4

Nærri kunning um starvið fæst við at ringja til Andrass Henriksen, skúlastjóra, á tel. 363222 ella 233222, ella Eyð Niclasen, vara-skúlastjóra, á tel. 223670

Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 15.februar kl.12

## Pedagogar til barnagarðin við Kráir í Hvalvík

Søkt verður eftir pedagogi til barnagarðin at byrja 15. februar 2008 ella eftir nærri avtalu.

**Størvini at søkja eru:**
Pedagogur til barnagarðin 30 t/v. og ella, vøggustovu 30 t/v.

Barnagarðurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum, 1 vøggustovu og eini smábarnastovu.

Barnagarðurin liggur í hugnaligum, barnavinarligum umhvørvi heilt oman til ta vælkendu stóru ánna.

**Vit ynskja:**
- At tú hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.
- At tú hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum og teim vaksnu.
- At tú hevur hug til at skapa og seta dám á okkara barnagarð.
- At tú hevur góð samstarvsevni og kann arbeiða sjálvsstøðugt.

**Setunarviðurskifti:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Nancy Poulsen, leiðara, á tlf. 772021 ella 422717.

Umsóknir við avritum av prógvi verða at senda til:
**Barnagarðin við Kráir**
Fo - 430 Hvalvík.
mail: nosi@post.olivant.fo

Umsóknarfreistin er í seinasta lagi tann **04.02.08**

# Eiðis kvøldskúli

### Vikuskiftisskeið í teldulæru

**Byrjanarskeið í rokniarki (Microsoft Exel)**
Leygardagin 9. februar og leygardagin 16. februar.
kl. 14.00 – 18.00

**Byrjanarskeið í heimasíðusniði (Frontpage)**
Leygardagin 8. mars og leygardagin 15. mars
kl. 14.00 – 18.00

Lærari: Lena Lastein
Luttøkugjald 300 kr. Skal gjaldast við skeiðsbyrjan.
Tilmelding á tlf. 423502 ella 273212

**Eiðis kvøldskúli**
www.eidi.fo



## ÍBÚÐ Í BLÓMUBREKKU

Íbúð á Blómubrekku, 75,8 kvm, miðskeiðis í Havn, verður við hesum lýst til sølu. Seinasta boð kr. 1.600.000. Áhugað kunnu venda sær til http://www.123hjemmeside.dk/blomubrekka6 ella ringja á tlf. 221922.

FELAGIÐ FØROYSKIR SJÚKRARØKTARFRØÐINGAR

## Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður 15. mars 2008 kl. 10.00 á Hotel Føroyum smbrt. viðtøkum felagsins við hesi dagsskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Val av atkvøðuteljarum
3. Góðkenning av dagsskrá
4. Góðkenning av starvsskipan
5. Frágreiðing formansins
6. Framløga av rammufíggjarætlan og roknskapi, harímillum áseting av limagjaldi
7. Innkomin uppskot
8. Val av tveimum grannskoðarum
9. Ymiskt

**Uppskot, sum skulu verða viðgjørd á aðalfundinum, mugu vera felagnum í hendi 1. mars 2008**

Morgundrekka fæst frá kl. 09.30.

Fundurin byrjar kl. 10.00 stundisliga.

Eftir fundin, á middegi verður okkurt til matna.

Tilmelding er neyðug til aðalfundin, og skal tilmeldast á skrivstovu felagsins í seinasta lagi týsdagin 10. mars kl.13.00.

TVØROYRAR KOMMUNA

## Seinkaður tunnusláttur á Tvøroyri

Aftur í ár, men eina viku seinni enn vanligt, kemur verjuskipið hjá sjóverjuni til Suðuroynna at hava tunnuslátur við børnunum.

Tiltakið verður sunnudagin hin 10.feb. kl. 14:00 umborð á HVIDBJØRNEN, sum fer at liggja við bryggju á Tvøroyri.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tvøroyrar Kommuna**
**og Færøernes Kommando**

# Lastbilur til sølu

Um hóskandi boð fæst er ein nýsýnaður Iveco Daily, við krana, til sølu.

Eginvekt 3.300. Maks. last 1.900. Totalvekt 5.200.

Typugrein nr. T 11765 0

Lastbilurin er frá 05.03.2001

Krani, Effer E 42

Kranin er frá 07.10.2005

2 sett av vetrardekkum fylgja við.

Lastbilurin stendur á parkeringsøkinum við kommunuskrivstovuna.

Nærri fæst at vita um lastbilin við at tosa við Jón Thomasen, tlf. 589011.

**Kvívíkar kommuna**
Víkarvegur 4 · 340 Kvívík · Tlf. 42 12 94 · Fax 42 14 98